## Tiltøk virka ov seint

Stjórnin í Saudiarabia heldur lítið um ætlanina hjá USA, Fraklandi og øðrum londum at seta tiltøåk í verk ímóti Iran fyri at fáa landið at sleppa sínum kjarnorkuverkætlanum. Tað fekk amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, at vita, tá hon í gjár var í Saudiarabia. Aftan á fundin teirra millum segði saudiarabiski uttanríkisráðharrin, at tiltøk muna ov lítið og harafturat virka tey alt ov seint. Saud Faisal prinsur segði, at tað er neyðugt við øðrum loysnum, sum kunnu fáa Iran at sleppa sínum kjarnorkuverkætlanum sum skjótast.



## Filmur um fiskiskap í Atlantis

Í annaðkvøld klokkan 19 verður ein 40 ára gamal filmur vístur um fiskiskap í Atlantis í Klaksvík. Tað er Jákup Anthoniussen, sum hevur upptikið filmin frá 1969-1972. Filmurin vísur fleiri kend gomul skip, ið fiska undir Grønnlandi, Íslandi, Newfundlandi, Barantshavinum og Føroyum. Við hesum filmi er møguleiki at síggja nógv kend andlit aftur, ið ikki longur eru í millum okkum. Tað munna vera mong, ið hava havt ein pápa ella abba, ið hava verið til fiskiskap í hesum tíðarskeiðinum, og í annaðkvøld verður so møguleiki at síggja tey aftur. Filmurin er umleið hálvanannan tíma, og er tað møguligt at bíleggja sær atgongumerki inni á www.atlantis.fo



*Fyri nøkrum árum síðani vóru fleiri, sum ynsktu at búseta seg heima á Sandi. Men tá óvissan um tunnilin gjørdist ov stór, minkaði hesi áhugin niður í nærum einki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fólk vóru positiv

**Málið um Sandoyartunnilin hevur verið frammi við millumbilum á politiska leikvøllinum, eftir at tosið av álvara kyknaði upp fyri eini 10 árum síðani.**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** Onkutíð var komið so nær, at fólk so smátt byrjaðu at síggja fram til dagin, tá fyrsta skotið skuldi loysast av.

Mong munnu minnast løtuna á havnarlagnum í Skopun, tá tingmenninir úr oynni fingu hetjumóttøku eftir at tingið hevði samtykt at fara undir ætlanina.

*Men hvussu var stemningurin á Sandoynni um hetta mundið?*

- Jú, tað merktist so sanniliga á fólki, at her fór okkurt gott at spyrjast burturúr. Tíðirnar vóru góðar og fólk vóru sera positiv.

- Tað gekk væl í samfelagnum, og fólk gleddu seg til at kunna koyra til Havnar á fyrsta sinni, sigur Brandur Sandoy.

Ein fylgja av hesi positivu gongdini var, at fólk komu við fyrispurningum um grundøki at byggja sethús á. Kommunurnar vóru við í hesum sama, og fleiristaðni fóru útstykkingar í gongd.

Fleiri hús vórðu bygd norðarlaga í Skopun, í Húsavík vórðu fleiri útstykkingar gjørdar og hús bygd, og tað sama gjørdi seg galdandi heima á Sandi.

**Men so steðgaði alt mestsum upp!**

### Vónbrot

Líka so stórt sum bjartskygnið var, líka so stórt gjørdist vónbrotið, tá avgerðin um tunnilin varð tikin og ætlanin skotin út í framtíðina enn einaferð.

helst eisini ein spurningur, um nøkur orsøk er at verða verandi á oynni. Hetta er ikki bara galdandi fyri tey sjálvi, men so sanniliga eisini fyri eftirkomarar teirra.

Tá ein tosar við fólk á oynni, er meiri at kalla líkt til, at tey harmast um at henda stóra ætlanin - og ikki minst oyggin sjálv - er á mangar mátar sett á "standby". Spurningurin er, um oyggin hevur nakra framtíð, ella fólk tíma at bíða eftir tunlinum.

Hetta sama prógva eisini hagtølini fyri talið av sandoyingum. Hagstovan hevur við millumbilum kunngjørt, hvussu broytingarnar í fólkatalinum eru, og ein skal ikki leita leingi eftir tølunum fyri Sandoynna, fyrrenn ein sær ta óhepnu gongdina.

### Vit skulu liva

Í 1985 búðu 1682 fólk í oynni, og er hetta størsta talið tey seinastu 25 árini. Síðani hevur bara gingið niður á bakka við fólkatalinum, og liggur talið nú rættiliga støðugt um tey 1400. Við ársskiftið var tað kortini komið niður á 1338.

Tað var eitt tíðarbil fyri nøkrum árum síðani, tá líkindi vóru fyri, at arbeiðið at gera tunnilin fór at byrja nakað skjótt. Men fólk mugu bara brynja seg við toli í dag, og tí er tað helst so, sum Brandur Sandoy tekur til:

- Vit skulu kortini liva, inntil tann dagurin rennur upp, tá koyrandi verður inn á meginøkið!

*Vit skulu kortini liva, inntil tann dagurin rennur upp, tá koyrandi verður inn á meginøkið*

Hóast líkt er til, at tað enn fara at ganga nøkur ár til Sandoyartunnilin gerst veruleiki, so fegnast sandoyingar um tey tiltøk, sum verða sett í verk í oynni í næstum.

Eitt av hesum er samtyktin um at byggjast skal ein ítróttarhøll, sum landið skal gera. Fólk fegnast sjálvandi um hetta, men tað eru kortini tey sum meta hetta sum eitt slag av "endurgjaldi" fyri tunnilin sum ikki kemur enn á sinni.

- Vit eru sjálvandi glað fyri at fáa høllina, eingin ivi um tað. Men okkara hægsta ynski er kortini at fáa ein undirsjóvartunnil!

- Tað er klárt, at hetta kom eisini at merkja tað vanliga fólkið. Nú gjørdust fólk ikki so positiv longur, og hetta órógvar fólkið rættiliga nógv.

Ein beinleiðis fylgja av útsetingini er, at lítið kemur í oynna av ungum fólki. Hetta skilir man fyri sovítt eisini, tí tað unga fólkið vil vera nærri miðøkinum.

Tað er snøgt sagt ov stór fjarstøða millum fólkið á Sandoynni og tey mongu tilboðini um bæði arbeiði, frítíðarítriv og annað sum finst á meginøkinum.

Hvussu stór henda fjarstøðan er, gevur Brandu Sandoy eitt dømi um:

Ein dagin herfyri var hann á fundi í Havn, og tá hann skuldi suðuraftur við Teistanum var long røð av bilum á Gomlurætt.

- Ja, henda røðin var so long, at eg mátti bíða í heilar 9 (níggju!) tímar, áðrenn eg slapp við.

- Nei, hetta er ikki beinleiðis nakað sum ein kann bjóða fólki í dag.

Líkt er til, at sandoyingar hava sjáldsama gott tol og góð evnir at bíða eftir bátinum í Skopun ella á Gomlurætt.

Men borgarstjórin á Sandi hugsar longur enn hetta:

- Hetta við bíðitíðini ávirkar sjálvandi vinnulívið her í oynni og ætlanirnar hjá øðrum at seta seg niður her.

- Tí tað er neyvan nøkur fyritøka sum fer at koma hendavegin, tá tað er so trupult at sleppa fram og aftur!